# Tíðindaskriv

## Føroyar vera umboðað í heimsmeistaraskapinum í inniróðri




Kappingin um WRICH/ heimsmeistaraheitið í inniróðri, verður í døgunum 25. og 26. februar.

7 føroyskir luttakarar hava kvalifiserað seg at luttaka í kappingini í einum ella tveimum flokkum.

Upprunaliga skuldi HM/WRICH (World Rowing Indoor Championships) vera í Hamburg, Týsklandi, men fyriskipararnir avgjørdu í desember 2021 at skipa tiltakið sum netborið, vegna farsóttina.

HM er fyri luttakarar U19 og eldri, og kappast verður í teinum á 500m og 2000m. Tríggir luttakarar frá 5 meginøkjum (Amerika, Afrika, Asia, Osiania og Europa) hava møguleika at kvalifisera seg fyri hvørt økið.
Sí bólkar og luttakarar her: [https://worldrowing.entries.regatta-systems.com/wrich/2022](https://worldrowing.entries.regatta-systems.com/wrich/2022)

Róðrarsamband Føroya skipar fyri almennum tiltaki í sambandi við kappingina um heimsmestaraheitið. Kappingin verður í aulaini í Læraraskúlanum. Áskoðarar eru vælkomnir til tiltakið fyri at vísa luttakarunum teirra stuðul.

| **500m - fríggjadagin 25. februar 2022** | **Starttíð** | **Luttakari** | **Felag** |
|---|---|---|---|
| Kvinnur U19 | 11:59 | Mira Winther Klit | AR |
| Menn U19 | 12:07 | Mattias Durhuus | HVR |
| Kvinnur U23 Lættvekt | 12:14 | Zoe Dickson | KÍF |
| Kvinnur U23 | 12:29 | Vár Guriardóttir Hansen | AR |
| Kvinnur Lættvekt | 12:44 | Sarita Kristina Hansen | - |
| Menn Lættvekt | 12:59 | Bergur Robert Dam Jensen | KÍF |
| Kvinnur Masters 30-39 Lættvekt | 13:14 | Sarita Kristina Hansen | - |
| Menn Masters 30-39 Lættvekt | 13:29 | Bergur Robert Dam Jensen | KÍF |

| **2000m - leygardagin 26. februar 2022** | **Starttíð** | **Luttakari** | **Felag** |
|---|---|---|---|
| Menn U19 | 10:20 | Mattias Durhuus | HVR |
| Kvinnur U23 Lættvekt | 10:35 | Zoe Dickson | KÍF |
| Kvinnur U23 | 11:08 | Vár Guriardóttir Hansen | AR |
| Menn Masters 30-39 Lættvekt | 12:38 | Bergur Robert Dam Jensen | KÍF |
| Kvinnur Masters 30-39 Lættvekt | 12:49 | Sarita Kristina Hansen | - |
| Kvinnur Masters 50-54 | 14:23 | Jóna Danielsen | FSR |